## Blikk úr Íslandi

Um einar seks vikur sleppa íslendingar at selja øl og sodavatn í blikkum til Føroya. Danir kunnu eisini flyta inn øl og sodavatn í blikkum, men teir sleppa ikki at selja øl, sigur Útvarpið. Tað eru bara íslendingar, sum hava tann framíhjárættin, men tað kann vera í stríð við heimastýrislógina. Tey, sum ætla sær at innflyta øl og sodavatn í blikkum, skulu hava eina góðkenda skipan, sum skal taka ímóti teimum tómu blikkunum.

## Færri klænar kvinnur

Hagtølini vísa, at fyrr vóru fleiri klænar kvinnur at síggja í gøtunum í Danmark og aðrastaðni enn í dag. Eitt nú sæst, at í 1987 høvdu fimm prosent av øllum dønum trupulleikar av, at teir vigaðu ov lítið, men at hesin parturin var bara tvey prosent í 2005. Hinvegin vísa hagtølini, at tað eru framvegis kvinnurnar, sum hava størri trupulleikar enn menninir, men serkøn siga tað vera sera gott, at gongdin tykist vera batnað.

# Sær heldur frægari út hjá virkj

**Millum feløgini, sum ikki hava staðið seg serliga væl seinastu árini, eru virkini hjá Sandoy Seafood. - Vit hava sett okkum fyri at venda gongdini, og málið er, at tað skal standa upp og niður við rakstrinum, tá hetta árið er umliðið, sigur Andreas F. Hansen, sum er virkisleiðari á Sandoy Seafood og samstundis formaður í Føroya Ráfiskakeyparafelag**




FISKAVIRKINI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Andreas F. Hansen hevur verið formaður í Føroya Ráfiskakeyparafelag í skjótt tvey ár, og tískil umboðar hann meira enn nakar annar føroyskar fiskakeyparar. Andreas er sjálvur maðurin aftanfyri virkini hjá Sandoy Seafood í Sandoynni.

Á virkinum í Skopun virka tey flak, mest úr upsa, og á virkinum á Sandi virka tey saltfisk, har upsi eisini er høvuðsgrundarlagið undir framleiðsluni.

Andreas sigur, at tað hevur gingið stiltið at fáa lønandi vinnu burtur úr saltfiskinum seinasta árið, meðan tað hevur gingið heldur frægari við frystu framleiðsluni í Skopun. Marknaðurin fyri saltaðum upsa hevur nevniliga verið vánaligur seinasta árið.

Ráfiskaprísirnir á toski, longu og brosmu, sum eisini verða virkað til saltfisk, hava verið rættiliga høgir á føroyska feskfiskamarknaðinum.

- Á hinari síðuni hevur tað gjørt mun, at upsin, sum annars hevur verið ógvuliga smáur undanfarin ár, nú aftur hevur eina betri støddd. Upsi verður bæði virkaður til fryst flak – og er ein týðandi partur av rávørugrundarlagnum undir saltfiskaframleiðsluni.

Andreas vísir á, at føroyingar gjøgnum langar tíðir hava havt Spania sum ein góðan og tryggan marknað fyri føroyskum saltfiski, men seinastu tvey árini hevur føroyski fiskurin fingið rættiliga harða kapping úr Íslandi.

- Vit hava verið sterkastir á hesum marknaði, men nú eru íslendingar vorðnir líka góðir sum vit til hesa framleiðslu. Enn eru norðmenn tó eitt sindur afturút við saltfiskinum í mun til okkum og islendingar, leggur hann aftrat.

### Venda gongdini

Millum feløgini, sum ikki hava staðið seg serliga væl seinastu árini, eru virkini hjá Sandoy Seafood, har Andreas sjálvur situr við ábyrgdini.

- Vit hava sett okkum fyri at venda gongdini, og málið er, at tað skal standa upp og niður við rakstrinum, tá ið hetta árið er umliðið.

Andreas sigur, at ábendingar eru um, at tað hevur gingið heldur frægari hjá fiskavirkjunum í 2006 enn í 2005 og 2004, har fleiri virki høvdu vánalig ár.

- Men enn er gongdin ikki nøktandi, leggur formaðurin í ráfiskakeyparafelagnum aftrat.

Eitt, sum kann gerast eitt sindur trupult fyri at síggja neyvu gongdina hjá nøkrum av virkjunum frameftir, er, at Faroe Seafood og Kósin hava keypt fleiri skip, sum nú eru partur av rakstrinum hjá hesum feløgum.

- Eg havi tó skilt, at skipavinnan verður rikin við síðuna av fiskavirkisframleiðsluni hjá hesum feløgum.

Andreas vísir á, at onkrir fundir hava verið millum limirnar í ráfiskakeyparafelagnum, og hóast lítið hevur verið tosað um neyv tøl, bendir mangt á, at nøkur feløg hava gjørt tað munandi betri í fjør enn undanfarin ár.

- Sum er, kann eg einki endaligt siga um gongdina, og eitt nú veit eg lítið um, hvussu gingist hevur hjá Faroe Seafood, sum er nógv tað størsta felagið innan føroyska fiskavirking og tískil hevur stóra ávirkan á samlaðu gongdina.

Roknskapirnir hjá øllum feløgum eru ikki almannakunngjørdir enn, og fyrr enn hesir fyriliggja, fæst neyvan nøkur endalig heildarmynd av gongdini fyri farna ár.

### Hampilig útlit

- At samlaða hallið hjá fiskavirkisvinnuni er minkað í 2006, kunnu vit sum so ikki brúka til nógv. Neyðugt er í longdini, at vinnan tjenar pening, og eg vil siga, at fleiri virkir seinastu tvey árini hava gjørt nógv fyri at rationalisera framleiðsluna.

Um útlitini annars, heldur formaðurin í Føroya Ráfiskakeyparafelag, at tey eru torfør at meta um.

- Tað er nú einaferð soleiðis, at marknaðarviðurskiftini kunnu broytast frá degi til dags, men sum støðan er beint í løtuni, er ikki líkt til, at tað fer at